# Hvalbiarbørn fingu sjáldsaman fong

**Tá ið børnini í dagrøktini í Hvalba fóru út at spæla nú ein morgunin, funnu tey nakað so sjáldsamt sum eina flogmús í túninum**

NATTÚRUFYRIBRIGDI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Flogmúsin royndi at spenna veingirnar, men hon var ússalig og orkaði ikki úr stað*

Av og á kemur tað fyri, at sjáldsom dýr, ið ikki hoyra heima um okkara leiðir, kortini villast hendavegin.

Tað fingu børnini í dagrøktini í Hvalba at sanna nú ein dagin.

Tá ið tey fóru út at spæla um morgunin, fekk dagrøktarmamman eyga á okkurt undarligt í túninum.

Tey tordu ikki ordiliga at nærkast hesum, men tá ið tey so spakuliga prikaði undir tað við einum pinni, spenti tað veingirnar út og tá sóu tey, at talan var um eina flogmús.

Ikki var hon stór, kroppurin lítið frægari enn ein eskja við svávulpinnum, men livandi var hon hóast alt, tó at hon tóktist nakað ússalig.

Tey fingu hana so í eina krukku.

Jens Keld Jensen í Nólsoy, sum er dýrakønur sum fáur, sigur tað er ikki ofta at flogmýs verða funnar í Føroyum, men kortini veit hann um útvið 30 skrásettar tilburðir.

Men hann sigur, at slíka flogmýs eru ikki heilt vandaleysar, tí tær kunnu verða smittaðar við hundaøði og bíta tær, kunnu tær smitta fólk. Hann veit um ein finnlending, sum er deyður av tí sama.

Hvalbingarnir fingu tí tey ráð at frysta flogmúsina og Jens Keld vil fegin hava hana til kanningar at vita. Eitt nú skal hann kanna hana fyri loppur og lýs, sum hann hevur stóran áhugað fyri.

Jens Keld Thomsen sigur, at summar flogmýs eru flytimýs, akkurát sum vit hava flytifuglar, men viðhvørt villast tær av leið og soleiðis er hendan uttan iva flogin til Føroya.

Uttan at hava kannað hesa flogmúsina nærri, heldur hann, at talan er um eina trølla-flogmús og so kann hon verða komin so langa leið sum sunnarlaga úr Póllandi ella úr Ungarn.

Men tær liva av flogkyktum og teimum er ikki nógv av í Føroyum hesa ársins tíð, so líkindini fyri at fáa hana at liva eru at kalla ongi.



*Børnini sótu spent og eygleiddi flogmúsina, har hon lá í eini krukku, sum enskar karamellur høvdu verið í. Frá vinstru eru børnini: Andrias Trygvi Midjord, sum nanar hjá dagrøktarmammuni, Sigrun Berg. Síðani koma Jónas Jespersen, André Thomsen og systkinini Manni Næs Mortansson og Elma Næs Mortansdóttir*

# James og børnini við nýggjari fløgu

**Fyri jól kemur nýggj fløga á marknaðin. Tað eru finalistarnir í føroysku barnaprixkappingini, sum luttaka á fløguni. Løgini eru nýggj og stílurin er nútímans poppur, so sum ungdómurin í dag vil hava hann**



TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Prix ella Nósabarnaprix. Vit kenna øll føroysku sangkappingina, har tað ræður um at kjósa – saman við Nósa – besta føroyska sangaran í ungdómsbólkinum.

Og finalistarnir í barnaprixnum eru við á fløgu, ið sum eisini sagt innan kappingina, kemur á marknaðin.

Og fløgan kemur fyri jól.

James Olsen, fyrireikari, leggur í hesum døgum síðstu hond á fløguna.

– Øll, uttan ein sangari, hava verið í upptøkuhølunum og sungið. Tá tað er av, so er klárt at ljóðblanda og væntandi kemur fløgan til jóla, sigur James Olsen.

James Olsen sigur, at talan er um nýggj løg í nútímans poppstíli, so sum tey ungu vilja hava tað. Løgini hava m.o. James Olsen, Kim Hansen og Bárður Háberg gjørt.

– Hetta eru góð løg og óivað er okkurt hitt ímillum tey, sigur James, ið leggur afturat, at arbeiðið at gera løgini hevur tikið tíð, tí tað at gera eitt gott lag er ikki sum at siga tað.

### Dugnalig børn

– Tað er fantastiskt, sum føroysk børn í dag syngja væl. Og sjálvandi hevur tíðin nakað við hetta at gera. Tey eru uppvaksin við MTV og øðrum, ið ikki var fyrr. Og tað er gott, at børn koma fram ung, og ikki tá tey eru 25 ár, tí tá er mangan nakað seint, sigur James Olsen.

– Fleiri av okkara dugnaligastu sangarum hava tikið lut í slíkum kappingum. Nevnast kunnu úr rúgvuni Eivør, Guðrun, Kaj, eg sjálvur og Brandur, ið øll hava verið ársins songrødd, vísir James Olsen á.

### Ongin ársungi

James Olsen er, sum árini eru liðin, ongin ársungi innan føroyskan tónleik. Hann kom fram sum ungur trummuleikari og sangari fyrst í áttatiárunum og av álvara síðst í áttatiárunum.

Hann fór til Íslands og fór á tónatindarnar har. Hann er vorðin betri og betri og er við í fleiri og fleiri samansetingum og tiltøkum.

Men sum fyrireikari er hann sermerktur, tí børnini og barnaprixkappingin hevur hansara áhuga.

– Ja, tað skerst ikki burtur, at eg havi víst børnunum ans og kanska hevur onkur lagt hetta til merkis. Ein hevur jú fyrireikað og staðið fyri mongum tiltøkum og prixkappingum millum ár og dag, sigur ein lítillátin James, tá eg spyrji eitt sindur um søguligt tilfar í samband við James og barnatónleik.

Vit semjast um at nevna nøkur av teim leiklutum hann hevur havt; Tiltøk sum barnaprix og so fløgurnar Grísaflísa Pætur, Terji og ketlingarnir og so eisini onkur íslendsk barnafløga.

Jú, James drívur á, og gongst sum ætlað, so er ein fløga við yngstu og dugnaligastu spírunum innan føroyskan popp á marknaðinum fyri jól.